UTTAN ÚR HEIMI

## Hávur drap fiskimann

Tann 22 ára gamli suðurafrikanski fiskimaðurin Henri Murray royndi at verja seg, tá ein stórur hávur legði á hann. Tvær ferðir eydnaðist tað honum at reka hávin burtur við harpunini, men so gingu kreftirnar undan.

Henri Murray er ikki tann fyrsti, sum hevur latið lív í bardaga við háv úti fyri suðurafrikonsku strondini tey seinastu árini. Í november í fjør doyði ein annar fiskimaður, tá ein hávur leyp á hann, og nakrar dagar seinni tók ein hávur eina eldri kvinnu, sum var farin at svimja nærhendis Cape Town.

Suðurafrikonsku myndugleikarnir siga, at munandi meiri hávur er at síggja úti fyri strondini nú enn, og serfrøðingar halda, at tað kemst av tí veksandi hitanum í sjónum. Serfrøðingarnir vita kortini ikki, at tann veksandi hitin ger, at hávurin nørist skjótari enn fyrr, men okkurt bendir á tað, siga teir.

Ein altjóða felagsskapur, sum heldur eyga við hávaálopum, sigur, at í fjør vórðu fólk álopin av hávi 61 ferðir, og at sjey teirra doyðu. Í 2003 vóru álopini 57 í tali.

## Stórur gestur

Norðmenn hátíðarhildu í gjár, at hundrað ár vóru liðin, síðani ríkiseindin ímillum Noreg og Svøríki bleiv uppleyst.

Í tí sambandi hevði amerikanski herflotin sent flogberan "Saipan" til Oslo at taka lut í hátíðarhaldinum. Skipið er bygt í sjeytiárunum, men er nútímansgjørt við allari nútímans tøkni. Tað hevur umleið 30 flogfør og tyrlur, og 1.800 mans eru við skipinum.

Men tað eru ikki bara menn við "Saipan", tí Donna M. Looney er skipari. Hon er ikki bara skipari á "Saipan", men stendur á odda fyri einari flotadeild, sum umfatar tveir aðrar flogberar umframt nøkur smærri herskip. Hetta var aðru ferð, at hon var á flotavitjan í Noregi. Fyrru ferð var fyri tjúgu árum síðani, tá hon var við einum herskipi, sum legði at í Bergen.

## Bjørn leyp á

Sunnukvøldið leyp ein bjørn á eina unga kanadiska kvinnu, sum var farin út í ein skóg at súkkla. Tá løgreglan kom fram á kvinnuna, var hon deyð.

Kanadisku myndugleikarnir siga, at bjørnin, ein grizzlybjørn, helt til í einum øki, har nógv fólk búgva, og tí bleiv hon flutt burtur haðani fyri átta døgum síðani. Men sunnukvøldið kom hon aftur og gekk og mól í einum frítíðarøki nakað vestan fyri býin Calgary. Júst har vóru Isabelle Dube og tvær vinkonur og súkklaðu, tá bjørnin leyp á tær. Tað eydnaðist hinum báðum kvinnunum at sleppa til rýmingar, men bjørnin fekk fatur á Isabelle Dube.

Nakað seinni bleiv bjørnin skotin. Myndugleikarnir siga, at hon var bara fýra ára gomul og vigaði 180 pund. Ein vaksin grizzlybjørn kann viga upp ímóti 800 pundum. Hetta er fyrstu ferð síðani 1998, ein bjørn hevur gjørt av við eitt fólk í hesum partinum av Kanada.

## 57 ára gomul fekk tvíburðar

Tann 57 ára gamla Rosie Swain var bæði mamma, omma og langomma, tá hon fyri tveimum mánaðum síðani gjørdist mamma eina ferð afturat.

- Eg veit, at hetta lukkast ikki hjá øllum, men hjá mær og manni mínum eydnaðist tað, segði Rosie Swain við sjónvarpið, tá hon fyri nøkrum døgum síðani vísti almenninginum tvíburðarnar. Lækni hennara, Deborah Kimberlin, segði, at hon hevði stúrt fyri, hvat kundi henda, men at allar kanningar høvdu víst, at alt var í lagi. At alt hevði gingið, sum tað skuldi, var ikki minst teirri góðu heilsuni hjá Rosie fyri at takka, segði læknin.

Umframt tvíburðarnar eigur Rosie seks børn, seks ommubørn og fimm langommubørn.

# Vil ikki útflýggja krígsbrotsmenn




*Ein hermaður hjá afrikonsku samgonguni á varðhaldi í einari flóttafólkalegu í Darfur*

**Næstan 200.000 eru deyð, og tvær milliónir eru rikin frá húsi og heimi í sudanska landspartinum Darfur. Nú skulu teir seku revsast, men sudanska stjórnin vil ikki samarbeiða**

DARFUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Altjóða revsirætturin í Haag er nú farin undir at viðgera tað, sum er hent í sudanska landspartinum Darfur, síðani ágangurin byrjaði har fyri tveimum árum síðani.

ST hevur latið revsirættinum ein lista við nøvnunum á 51 persónum, sum eru undir illgruna fyri at hava framt krígsbrotsverk í Darfur. Listin er ikki almannakunngjørdur, men hildið verður, at har eru týðandi sudanskir stjórnarlimir og herovastar umframt leiðarar í uppreistrarrørslum.

USA var leingi ímóti, at revsirætturin skuldi taka málið upp, tí amerikanska stjórnin viðurkennir ikki rættin, men í apríl slakaði USA og tók undir við, at álæra verður reist ímóti teimum seku í Darfur. Samstundis hevur Washington fyri trygd fyri, at amerikanarar í Sudan verða ikki drignir fyri rættin.

Luis Moreno Ocampo, sum stendur á odda fyri kanningunum hjá revsirættinum, sigur við Reuters, at rætturin fer at leggja størsta dentin á at fáa fatur á teimum, sum hava høvuðsábyrgdina av sorgarleikinum í Darfur. Hann leggur dent á, at skal rætturin røkka máli sínum, má hann fáa hjálp frá viðkomandi myndugleikum. ST hevur lovað rættinum fullan stuðul, men sudanska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at útflýggja sudanskar ríkisborgaar til rættarsókn uttanlands. Hon ætlar sær heldur ikki at samstarva við rættin á annan hátt.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, var í Darfur fyri einari góðari viku síðani, og hann sigur støðuna vera syndarliga.

- Tey siga, at tað er betri nú enn í fjør, men vit kunnu kortini ikki góðtaka hetta, sigur Annan við Rauters.

# Russiskir hermenn ræna fólk í Kekenia

**Myndugleikarnir í Kekenia viðganga nú, at russiskir hermenn hava burturflutt nógv fólk har**

BURTURFLYTINGAR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Mannarættindafelagsskapir hava leingi lagt russiska herin í Kekenia undir rán og burturflytingar, og nú viðgongur kekenski forsetin, Alu Alkhanov, fyri fyrstu ferð, at tað er so.

- Burturflytingarnar eru munandi færri nú enn fyrr, og nú hava hermenninir ábyrgdina av ímillum fimm og tíggju prosentum av burturflytingunum, segði forsetin á einum tíðindafundi mánadeagin. Hann legði afturat, at kekensku myndugleikarnir fara at gera sítt til at fáa enda á lógloysinum.

Amnesty International sigur seg fegnast um, at kekensku myndugleikarnir taka burturflytingarnar í álvara. Felagsskapurin hevur leingi víst á, at nógvir kekenar eru horvnir, og at eingin hevur hoyrt nakað aftur frá teimum.

Russiski umboðsmaðurin í Kekenia, Vladimir Lukin, segði í vár, at í fjør vórðu umleið 1.700 fólk burturflutt í Kekenia, og tað samsvarar væl við upplýsingar, sum russiski mannarættindafelagsskapurin Memorial hevur almannakunngjørt. Memorial og Human Rights Watch vilja vera við, at russiskir hermenn høvdu ábyrgdina av umleið einum triðingi av burturflytingunum í fjør, og at hini vórðu burturflutt av deildum, sum stuðla russum.

Mánadagin søgdu fólk í kekensku bygdini Prigorodnoje, at hermenn við gekkaskorti høvdu burturflutt seks ungar menn í bygdini. Sambært HRW eru tað vanliga ungir menn, sum verða burturfluttir.